Kurslækkingar

Væntaða rentuhækkingin í Bretlandi varð av ongum, og pundið er aftur fallið munandi. Næsti rentufundur í Bretlandi verður um tríggjar vikur. Japanarar selja amerikansk lánsbrøv og dollarar og keypa yen fyri á tann hátt at stuðla japanska yenninum. Harvið er dollarin og amerikanski marknaðurin fallin, og hevur hetta ávirkað meira heimligu marknaðirnar.

Seinasta vikan hevur á meira heimliga fíggjarøkinum verið merkt av páskafríði, men so er ikki allastaðni. Gjaldoyramarknaðirnir og partvíst eisini virðisbrævamarknaðirnir hava havt opið skírhósdag og annan páskadag.

Pundið fallið aftur

Bretski tjóðbankin - Bank of England - hækkaði ikki renturnar á páskum. Dagarnar áðrenn bretska rentufundin fanaðu vónirnar um eina rentuhækking, og bretska pundið - GBP - fall. Síðan 1. apríl, tá gjaldoyrahandlarar vóru sannførdir um eina rentuhækking, er pundið fallið úr 1180,33 til 1159,75.

Næsti fundur í bretska tjóðbankanum, har møguleiki er fyri eini rentuhækking, er um tríggjar vikur.

Dollarin eisini viknaður

Eins og bretska pundið er amerikanski dollarin USD - fallin seinastu dagarnar. Høvuðsorsøkin til fallið er, at japanski tjóðbankin hevur selt dollarar og keypt yen, fyri á tann hátt at stuðla ti nógv viknaða yenninum.

Kurslækkingar á páskum

Tað sigst, at japanski tjóðbankin fíggjaði stuðulin av japanska yenninum við sølu av amerikanskum lánsbrøvum. Talan var um stóra sølu, og av hesum fall amerikanski marknaðurin annan páskadag.

Hetta hevur havt við sær, at kursstøðið á meira heimligu marknaðunum er fallið. Av tí at nógvir handlarar høvdu frí í síðstu viku er væntandi, at næstu dagarnir fara at vísa, hvørja leið danski marknaðurin heldur.

10-ára danska statslánsbrævið - 7% st. lán 2007 - kostaði kl. 12 í gjár 114,38 móti 114,52 fyri viku síðan. 2-ára danska statslánsbrævið - 6% st. lán 1999 - kostaði 102,48 móti 102,59 fyri viku síðan. Føroyska lánsbrævið - 5% FRL 1999 - kostaði 99,84, sum svarar til eina effektiva rentu á 5,08 pst.

Føroya Banki

GBP Enskt pund



NOK Norsk króna

US dollari

FRF Franskur frankur

DEM Tyskur markur

JPY Japanskur yen

7% Dansk Stat 2007

Peningamarknaðarrentur, DKK (CIBOR)	14. apríl 98	7. apríl 98	14. apríl 97
Diskonto*	3.50%	3.50%	3.25%
1 mánað	3.85%	3.84%	3.59%
3 mánaðir	3.90%	3.89%	3.67%
6 mánaðir	4.05%	4.05%	3.81%

*: Seinast broytt hin 10. oktober 1997

Gjaldoyra	14. apríl 98	7. apríl 98	14. apríl 97
US dollari	692,80	700,70	656,20
Enskt pund	1159,75	1167,44	1065,34
[illegible]	381,31	381,29	380,91
[illegible]	91,89	91,77	94,19
Franskur frankur	113,75	113,75	113,25
Japanskur yen	5,342	5,2487	5,1923

Lánsbrøv	8. apríl 98		6. apríl 98		14. apríl 97	
	Kursur	Eff. renta	Kursur	Eff. renta	Kursur	Eff. renta
5% Føroya Landst. 1999*	99.85	5.08%	99.99	4.99%		
6% St. lån 1999	102.50	4.38%	102.65	4.29%	103.36	4.59%
6% St. lán 2002	105.28	4.68%	105.45	4.65%	101.92	5.58%
[illegible]	114.42	5.06%	114.48	5.05%	101.00	6.85%

[illegible] ...urin og effektiva rentan 8. apríl 1998 [illegible] Av somu orsøk eru tølini [illegible] ... fyri veruliga marknaðarkursin [illegible]

Vinnan fyrireikar seg til oljuvinnuna

Arbeisgevarafelagið fer í samstarvi við Oljufyrisitingina at leggja størri dent á at fáa føroyskar fyritøkur við í oljuvinnuna



ELI GUTTESEN

Føroya Abeiðsgevarafelag arbeiðir støðugt við at menna føroysku vinnuna til eina komandi oljuvinnu.

Í februar mánaði skipaði Arbeiðsgevarafelagið fyri einari vinnuvitjan í Stavanger, har føroysk virkir høvdu møguleikan at hitta norsk virkir innan somu vinnugrein.

Eini 40 luttakarar vóru við á ferðini, og hesir umboðaðu eini 25 føroysk virkir. Luttakararnir vóru sera vælnøgdir við ferðina, og teir fingu holla vitan um, hvussu veitarar innan oljuvinnuna arbeiða. Í fleiri førum varð ítøkiligt samstarv avtalað.

Tiltøk fyri framman

Mikudagin 22. apríl verður eitt seminar á Hotel Føroyum. Endamálið við hesum seminari er at geva føroyskum virkjum eina greiðari fatan av, hvat fer at henda, tá royndarboringar fara í gongd.

Fyrst verður ein simulering av royndarboringum og øllum avleiddum virksemi, á so neyvum støði, at greiða fæst á øllum nøgdum, sum skulu til og frá og teirra tittleika. Seinnapartin henda dagin verður bólkakjak við trimum høvuðsevnum: 1. Kontraktir og treytir og annað í sambandi við umbiðing, 2. Góðskustýring og trygd og 3. Logistikkur.

Seminarið verður gjørt í samstarvi við Amerada Hess bólkin, og teir koma við royndum frá oljufeløgum og teirra undirútveggjarum.

Norðmenn koma higar

Eftir væleydnaðu vinnuvitjanina í Stavanger í februar hevur Stavanger Næringsforening gjørt av at gera ein tilsvarandi túr til Føroya. Henda vitjan verður í døgunum 21.-24. mai, og fríggjadagin 22. mai verður skipað fyri fundum millum føroysk og norsk virkir. Somuleiðis verður høvi hjá norsku gestunum at vitja føroysk virkir.

Skráseting neyðug

Í farna mánaði hevur Arbeiðsgevarafelagið í samstarvi við Oljufyrisitingina sent ein faldara til øll tey 32 oljufeløgini, sum hava søkt um forkanningarloyvi á føroyskum øki. Hesin faldarin eggjar oljufeløgunum til at brúka føroyskar tænastur og veitingar.

Í næstum er ætlanin at gera eina uppfylging av hesum faldara. Hetta er ein neyvari skráseting av føroysku fyritøkunum, sum hava áhuga í oljuvinnuni. Tilfarið skal lýsa fyritøkuna og ítøkiligt vísa á, hvat fyritøkan er før fyri at veita av vørum og tænastum.

Tilfarið verður sent til feløgini, sum hava søkt um forkanningarloyvi á føroyskum øki.

Øll virkini, sum láta seg skráseta við tænastuveitingum til oljuvinnuna fyri eyga, gerast partur av einum oljubólki hjá Arbeiðsgevarafelagnum.

Ætlanin er, at felagið altíð skal seta seg í samband við hesi virkir, tá skipað verður fyri tiltøkum í oljuhøpi. Harvið fáa virkini møguleika fyri at ávirka fyrireikingararbeiðið framyvir.

5.700 ábyrgdarar hittast til fundir kring landið

Í kvøld byrja ábyrgdarfundirnir hjá Sparikassanum kring landið, sum vanliga savna nógv fólk. Fyri tveimum árum síðani vóru 1.800 fólk á hesum fundum

SNORRI BREND

– At gloppa hurðina til allar ábyrgdarar hjá stovninum kring landið.

Við hesum í huga skipar Sparikassin hesar komandi dagarnar fyri ábyrgdarfundum á seks ymiskum støðum, har bæði álvari og gaman er á skránni.

Fyrst og fremst verða hesir fundir skipaðir sum ein kunning av virkseminum og gongdini í peningastovninum. Men í álvarseminum verður dentur lagdur á at hava eina hugnaliga samkomu fyri ábyrgdarar og ábyrgdarpersónar í Sparikassanum.

Hesir fundur verða hildnir annaðhvørt ár, og longu í kvøld verður fyrsti fundurin hildin í manna felagshúsinum á Sandi. Síðani verða hesir fundir hildnir hvør eftir annan fram til 24. apríl, tá seinasti fundurin verður í Havn.

Gaman og álvari

Ábyrgdarfundirnir hjá Sparikassanum verða hildnir annaðhvørt ár. Og á øðrumhvørjum fundi er val á skránni, men ikki í ár.

Tí verður í størri mun lagt upp til ein hugnaligan fund, har varastjórin í Sparikassanum, Marner Jacobsen og nevndarformaðurin Petur Zachariasen fara at greiða frá gongdini tá seinastu tíðina.

Dentur verður haraftrat lagdur á lættari innsløg. Millum hesi verður rithøvundurin, Hanus Andreassen sum á teimum seks ábyrgdarfundunum fer at bera fram hugleiðingar sínar um evnið »Duga vit at lurta?«

Men har verður eisini sangur og tónleikur. Kenda sjónleikarkvinnan, Laura Joensen fer at framføra smærri leikir, og ikki minni kendi sangfuglurin, Kim Hansen fer at spæla og syngja á hesum fundum.

Hinvegin fer ein á fundunum kring landið at leggja dent á at láta lokalar kreftir at hava smærri innsløg. Ein góður biti hoyrir sjálvandi við til skránna.

5.700 ábyrgdarar

Hóast hetta tiltakið við ábyrgdarfundunum er nýtt, so er líkt til at fólki dáma væl at koma á hesar fundirnar. Fyri tveimum árum síðani vóru umleið 1.800 fólk á ábyrgdarafundi.

Hesa ferð byrja fundirnir sum nevnt á Sandoynni í kvøld, og longu fríggjakvøldið aftur í Trongisvági. Mánakvøldið í næstu viku verður fundur í Bygdarhúsinum í Miðvági, kvøldið eftir í Bygdarhúsinum í Hósvík og mikukvøldið í Ítróttarhøllini í Runavík.

Seinastu fundurin verður hildin í Ítróttarhøllini í Havn fríggjakvøldið í næstu viku. Har plagar at vera serliga nógv fólk, fyri tveimum árum síðani heili 800, so trongligt var at fáa pláss fyri øllum.

Nevnast kann, at kring landið hevur Sparikassin íalt einar 5.700 ábyrgdarar.

Sparikassin hevur íalt 5.700 ábyrgdarar kring landið, sum hesar komandi dagarnar verða hodnir til fundar

Fótbóltur:

Enn ein stórsigur til HB

Mangan brestur ætlan. Ætlanin var, at 18 steypadystir skuldi spælast um páskahøgtíðina, men orsaka av nógvum kava blivu bert tríggir dystir spældir

GUNNAR DAHL-OLSEN

Í Gundadali hevði HB heimadyst móti FS Vágar. HB byrjaði væl í fyrsta dystinum í kappingini um Løgmanssteypið, og í fyrra dystinum móti FS Vágar vann HB storsigur, 7-0. Í fyrra dystinum komu flestu málini í síðstu minuttunum av dystinum, og soleiðis bleiv eisini mánadagin. Støðan var 1-1 í hálvleikinum, og tað gingu nógvir minuttir áðrenn HB aftur megnaði at skora. Men tá avtornaði vann HB dystin 6-1.

Spælið gekk fyri tað mesta fyri seg framman fyri FS Vágar málið, men stóran part av dystinum vóru HB-leikararnir ikki nóg effektivir, og mál spurdist tí ikki burtur úr. FS Vágar stríddist eisini nógv, og megnaði tí fleiri ferðir at senda bóltin út frá aftur, og á tann hátt at halda HB-leikarunum burtur frá vandamiklum málmøguleikum.

Málverjin hjá FS Vágar, Johan á Mýrini, hevði úr at gera, og fleiri ferðir bjargaði hann góðum málmøguleikum. Í fyrra hálvleiki sendi Andrew av Fløtum eitt frálíkt skot móti høgru samankoming, men Johan bjargaði meistarliga.

Í seinna hálvleiki helt Johan fram við góðum málverjuavriki, men tá seinni hálvleikur var hálvrunnin gjørdist HB-leikararnir alt meira effektivir og eitt skot fyri og annað eftir fór í málið.

Suni Fríði Johannesen skoraði til 1-0. Eyðfinn Fjalsbak javnaði til 1-1 við einum frálíkum frísparki, sum Kaj Leo Johannesen als ongan møguleika heiði at bjarga. Eyðfinn sendi frísparkið beint upp í samankomingina, og 1-1 var støðan í hálvleikinum.

Jens Erik Rasmussen skoraði til 2-1, og Allan Mørkøre til 3-1. Rói Árting kom inn fyri Inga Rasmussen tá hálvur tími var spældur av seinna hálvleiki, og stutt eftir skoraði hann til 4-1. Jóhannis Joensen skoraði til 5-1, og beint áðrenn leikslok skoraði Andrew av Fløtum seinasta málið til 6-1.

TB góða byrjan

TB fekk javnleik móti B36 í fyrsta dystinum, og í dystinum móti Sumba bleiv tað til ein tryggan sigur. TB vann dystin 4-1 og liggur nú á odda í bólki 2 við fýra stigum.

Alexander Radosauljevic legði TB á odda til 1-0 tíðliga í fyrra hálvleiki, men 20 minuttir vóru leiktir megnaðu sumbingar at javna. Tað var nýggi venjarin hjá sumba, Thomas Birch, ið sendi eitt avbera gott skot móti TB-málinum. Pól F. gjørdi honum tað eftir tíðliga í øðrum hálvleiki, og sendi eitt flott langskot fram við málverjanum hjá Sumba, Rúna Midjord, og so var støðan 2-1. Eyðun Svalbard skoraði til 3-1 í 80. minutti, og beint fyri leikslok skoraði Hermann Mortensen og so gjørdist støðan 4-1 til TB.

Óli Johannesen er farin aftur til TB, og tað fer ivaleyst at styrkja nógv um verju- og loftspælið hjá TB.

Ein trupulleiki hjá suðuroyarliðunum hevur verið tann, at fleiri av leikarunum hava ikki fingið vant, tí teir hava bústað og arbeiði í Havn. Fyri ikki at missa leikarar og fyri at økja um áhugan hjá hesum, hava suðuroyar feløgini í felag sett ein venjara, sum skal syrgja fyri, at hesir leikarar verða í nóg góðari venjing. Hans Nielsen er settur til at taka sær av venjingini av hesum leikarum.

VB ognaði sær trý stig

Eisini í Vági bleiv grivið dugliga, og sunnudagin bleiv ein dystur spældur millum suðuroyarliðini, VB og Royn.

Væl lá fyri hjá VB-leikarunum, Magna Magnussen, og hann skoraði tvey tey fyrstu málini. Helgi Olsen minkaði um munin til 1-2, men John Eystberg økti aftur um munin, tá hann skoraði til 3-1.

Vit frætta úr Vági, at spælið var ikki av tí besta, og at vágbingar ikki vóru nøgdir við sitt egna avrik. Bæði liðini høvdu tó onkran málmøguleika aftrat, men fleiri mál spurdust ikki burturúr.